LEKS
ADVOKATFIRMA

J.nr. 2024345 AVH/rm

# UPPRIT

*Viðmerkingar til fyribils niðurstøðu hjá Landsstýrismálanevndini viðvíkjandi klaguni hjá Jacob Vestergaard um embætisførsluna hjá Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum.*

Undirritaði er biðin av landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum um at ummæla omanfyristandandi fyribils niðurstøðu hjá Landsstýrismálanevndini.

Undirritaði fer í hesum uppriti stutt at gjøgnumganga tær yvirskipaðu reglurnar, lóg um ábyrgd landsstýrisins, reglurnar um próvdøman í revsimálum og mína meting av málinum.

## 1. Landsstýrismálanevndin

Við heimild í § 38 í løgtingslóg um Stýrisskipan Føroya, hevur Landsstýrismálanevndin eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt. Tað vil siga, at Landsstýrismálanevndin hevur rættarligt eftirlit við, at løgmaður og landsstýrismenn halda lóggávuna. Um nevndin tekur mál upp til viðgerðar, ger nevndin niðurstøðu um illgruni er um brot á lóggávu er framt Um illgruni er um, at óregluliga hevur verið atborið, hevur nevndin heimild til at krevja at løgtingsformaðurin setir ein kanningarstjóra.

Stýrisskipanarlógin ásetir beinleiðis í § 38, sambært viðmerkingunum, at um nevndin hevur illgruni er um lógarbrot, so so skal nevndin krevja, at ein kanningarstjóri verður settur. Tað er tó komin ein siðvenja, at nevndin sjálv ger niðurstøður í smærri einføldum málum, har hon vísir á, at lógarbrot kann verða framt. Eg finni tó einki dømi um, at nevndin hevur mett, at lóg um ábyrgd landsstýrisins skal verða brotin. Hesi mál eru heldur ikki eftir síni natúr einføld.

Tað er hvørki Landsstýrismálanevndin ella kanningarstjórin, sum taka støðu til um ákæra skal reisast móti landsstýrisfólkum. Heimildin til tað er ásett í grein 9 í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins, sum sigur, at tað er Løgmaður eins væl og Løgtingið, sum kunnu gera av at reisa ákæru. Tað er heldur ikki uppgávan hjá nevndini at hava tað politiska eftirlitið við tingarbeiði. Um løgtingslimir meta, at limir í landsstýrinum forbróta seg politisk, hava teir møguleika fyri at reisa misálit móti viðkomandi ella samtykkja eina nøs móti viðkomandi. Nevndin hevur bara eftirlit av einum rættarligum slag.



Undir Bryggjubakka 21 | Box 106 | 110 Tórshavn | Tel (298) 720000 | advokat@advokat.fo | V-tal 561649

Uppgávan og grundarlagið fyri niðurstøðu nevndarinnar er at gera løgtingið (ella løgmanni), varug við, at tað kann verða grundarlagi fyri at taka rættarliga støðu til, um eitt mál um brot á løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins skal reisast.

Um nevndin í sínari niðurstøðu til løgtingið heldur, at tað er framt eitt brot, so merkir tað, at nevndin á einum *objektivum* rættarligum grundarlagi er av tí fatan, at viðkomandi kann dømast fyri brot á løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins. Hinvegin leggur lógin upp til, at har tað kann vera illgruni um okkurt, so skal setast ein kanningarstjóri til at meta um málið.

Tað eru dømir um mál, har mál hava verið reist uttanum landsstýrismálanevndina, og har stovnur undir løgtinginum hevur mett, at brot var gjørt á lóg um ábyrgd landsstýrismanna. Hetta var galdandi í tí sonevnda grannskoðaramálinum, har Løgtingsins umboðsmaður metti í síni niðurstøðu, at tað vóru framd álvarslig rættarbrot. Tá valdi løgtingið at seta ein óheftan advokat at kanna málið. Niðurstøðan hjá viðkomandi var, at einki grundarlag var fyri at reisa ákæru.

## 2. Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna

Løgtingslógin um ábyrgd landsstýrisins (ll. nr. 90 frá 4. juni 1996) viðvíkir ábyrgdini hjá løgmanni og landsstýrisfólkunum fyri teirra embætisførslu, sbrt. § 1.

Í fyriliggjandi máli, er § 5 viðkomandi, tí Landsstýrismálanevndin skal í hesum máli taka støðu til, um landsstýriskvinnan Ingilín D. Strøm hevur framt brot á § 5, stk. 2 í løgtingslógini um ábyrgd landsstýrisins. Ásetingin er soljóðandi:

***§ 5. Løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.***
***Stk. 2. Ásetanin í stk. 1 er eisini galdandi, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villeiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.***

Hendan greinin skipar revsireglurnar. § 5, stk. 2 áleggur løgmanni og landsstýrismonnunum ávísar skyldur, hvat viðvíkur at geva upplýsingar. Sostatt kann Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna revsast, um hon hevur givið Løgtinginum skeivar ella villeiðandi upplýsingar, og hon gjørdi hetta tilætlað ella av grovum ósketni (§ 5, stk. 2, 1 lið).

Hvat viðvíkur skeivum ella villleiðandi upplýsingum er sannleiksskyldan treytaleys. Tá skulu allar upplýstu upplýsingar vera rættir, uttan mun til slag av upplýsingum.

Soleiðis tulkar Hans Gammeltoft – Hansen eisini ásetingina m.a. í sambandi við málið um Eysturoyartunnilin, sum hann leiddi í sínum leikluti sum kanningarstjóri. Somu fatan metir hann eisini vera váttaði í teimum serligu viðmerkingunum til donsku lógina um ministres ansvarlighed (Ministeransvarlighedsloven), sum tann føroyska lógin er gjørd eftir, og tí kann tulkast samsvarandi eftir.

Skyldan til at ikki geva villleiðandi ella skeivar upplýsingar inniheldur ikki beinleiðis eina upplýsingarskyldu, men harafturímóti eina sannleiksskyldu, sum ger seg galdandi um løgmaður ella landsstýrisfólkini av egnum ávum ella sum svar uppá spurning, geva upplýsingar ella hendingaferð hava skyldu til tess.

Skyldan til, at ikki halda aftur upplýsingar (tiga) í sambandi við, tá Løgtingið viðger eitt mál, og tá hesar upplýsingar eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum, er harafturímóti ein upplýsingarskylda fyri løgmann ella landsstýrisfólkini. Hesa upplýsingarskyldu skulu løgmaður ella landsstýrisfólkini lúka av egnum ávum, og ikki bert í samband við svar uppá spurningar.

Sannleiksskyldan og upplýsingarskyldan skulu síggjast sum rættsligir standardar, hvørs tulking og útfylling skulu síggjast aftur í praksis.

Eitt av endamálinum við hesi skyldu er at tryggja, at parlamentið, limirnir og nevndir til eina og hvørja tíð fáa eitt nøktandi grundarlag fyri sjálvstøðugt at meta um mál, ið eru partar av tí parlamentariska arbeiðinum.

Pernille Boye Koch, cand.jur, ph.d í almennum rætti hevur m.a. í eini grein U.2020B.125, um "Ministerens sandheds- og oplysningspligt" viðgjørt evni. Í greinini hevur hon hugt nærri eftir ávísum málum í Fólkatinginum, har upplýsingar- og sannleiksskyldan hjá ráðharrum hevur verið viðgjørd og tess avleiðingar av hesum. Í stuttum ber til at siga, at hóast eina stranga sannleiksskyldu, so eru málini ymisk og fyritreytirnar ymiskar, og tí ber illa til at koma við eini felags niðurstøðu uppá avleiðingarnar, tí hetta var ein metingarspurningur í mun til hvørt ítøkiliga máli sær.

Sum tulkingaríkast til tað eina máli í greinini (Dan Lynge - sagen) kann nevnast, at "*idet beretningen lader det være afgørende, om der er sagt noget decideret usandt. At det konkrete svar i konteksten kan være vildledende tillægges ikke betydning, så længe det ikke kan dokumenteres, at det har været ministerens hensigt at vildlede.*"

Sum tulkingaríkast til eitt annað mál (Statsløsesagen) viðmerkir Pernille Boye Koch, "*at tilkendegivelsen fra Folketinget er yderst bemærkelsesværdig, fordi den eksplicit kristiserer ministerens orientering af Folketinget; ikke fordi de konkrete oplysninger isoleret set er usande, for det er de ikke, men fordi formuleringen ud fra en umiddelbare sproglig forståelse giver et misvisende billede af situationen. Beretningen er således et udtryk for en udvidet og skærpet forståelse af ministerens forpligtelser og dermed en fravigelse af kursen i forhold til Dan Lynge – sagen.*"

Í fyriliggjandi málið hjá Ingilín D. Strøm kann staðfestast, at frágreiðingin frá landsgrannskoðanini var handað øllum tinglimum, og allir tinglimir sostatt høvdu sama

grundarlag at taka støðu útfrá. Um mett verður, at Ingilín D. Strøm í einum svari uppá ein spurning hevur orðað seg á ein hátt, sum møguliga er misvísandi ella svarið er skeivt, má tað hinvegin tryggjast, at greið prógv eru fyri brotinum um, at Ingilín D. Strøm í hesi gerð tilvitað gav Løgtinginum skeivar upplýsingar og harvið breyt § 5, stk. 2 í lóg um ábyrgd landsstýrisins.

Spurningurin um, hvat krevst fyri at staðfesta (og døma) brot á § 5, stk. 2 í lóg um ábyrgd landsstýrisins, er viðgjørdur niðanfyri undir pkt. 3.

3. ***Próvbyrðan í revsimálum***

Lóg um ábyrgd landsstýrisins hevur hesa áseting um revsing í § 6:

***§ 6. Revsingin eftir § 5 er bót ella fongsul upp til 2 ár.***
***Stk. 2. Er brotið gjørt av ósketni, er revsingin bót ella fongsul í upp til 4 mánaðir.***

Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins er ein revsilóg, og tá støða skal takast til, um brot er gjørt á lógina, eru galdandi somu meginreglar sum við brotum á aðrar revsilógir.

Krøvini fyri at verða dømdur eru rættuliga strong. Í stuttum kann sigast, at rættarreglan ***"in dubio pro reo"*** er galdandi. Orðingin merkir, at ivin skal koma tí ákærda til góðar.

Hendan almenna grundreglan sæst aftur í nógvum dómum. Meginreglan er eisini staðfest í europeiska mannarættindasáttmálanum grein 6, nr. 2, sum er galdandi fyri Føroyar samsvarandi "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention". Ásetingin er soljóðandi, soleiðis sum hon er sett í gildi í Føroyum:

***Enhver, der anklages for en lovovertrædelse, skal anses for uskyldig, indtil hans skyld er bevist i overensstemmelse med loven.***

Rættarreglan merkir, at próvbyrðan liggur á ákæraranum. Tað er sostatt ákærarin, sum skal prógva, at allir partar av revsiásetingini eru loknir.

Hetta merkir, at ikki einans skal tað verða prógvað, at objektivt er gjørt tað, sum ákæran sigur skal verða hent, men eisini at subjektivu treytirnar eru loknar, tvs. í hesum førinum tilvitað ætlaði at lúgva, ella við grovum ósketni kom til at lúgva.

Viðvíkjandi teimum objektivu treytunum, er tað ikki nóg mikið, at tann tulking av hendingini ákærarin kemur við, sýnist at vera mest sannlík men eisini, at prógvið er við tílíkari styrki, at tað ikki kann verða nakar rímiligur ivi um, at tann ákærdi er sekur í ákæruni. Hetta samsvarandi princippið "In dubio pro reo".

4. **Ítøkiliga málið – rættslig meting:**

Sum nevnt undir pkt. 1, er uppgávan hjá nevndini, tá ið hon tekur eitt mál til viðgerðar um nevndin heldur, at brot er framt á løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins. Um nevndin heldur hetta, skal hon gera tað a einum objektivum rættarligum grundarlagi, tvs. at nevndin metir,

at viðkomandi kann dømast fyri brot á løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins. Heldur nevndin ikki tað, skal hon vísa málið frá sær. Undantakið er, at um nevndin metir, at tað kann vera illgruni um, at nakað revsivert er gjørt, so kann hon í staðin biðja løgtingsformannin seta ein kanningarstjóra. Hetta er neyðugt, tá ið tað má gerast eitt størri kanningararbeiði, áðrenn støða kann takast til, um tað fyriliggur eitt revsivert brot á lógina. Hetta er somuleiðis galdandi, um talan er um torføra løgfrøði, sum krevur servitan.

Í málinum sigur Landsstýrismálanevndin soleiðis í síni fyribils niðurstøðu:
***landsstýriskvinnan í umhvørvismálum gav, tá hon við 3. viðgerð av løgtingsmálinum 59/2023 segði, at hon ongar ábendingar hevði fingið um trupulleikar við langtíðarhaldførinum við Bústøðum, tilvitað Løgtinginum skeivar upplýsingar og breyt harvið § 5, stk. 2 í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins.***

Í argumentatiónini fyri fyribils niðurstøðuni, velur nevndin at halda seg orðarætt til klaguna, sum er soljóðandi:
***Klagarin heldur at illgruni kundi verið um, at landsstýriskvinnan tilvitað hevði sagt ósatt, tá hon við 3. viðgerð av málinum tann 2. mai 2024 segði, at hon ikki hevði fingið ábendingar um, at trupulleikar vóru við langtíðarhaldførinum hjá Bústøðum.***

Fyribils niðurstøðan setur inn sum eina fortreyt, at tað skal gerast ein tulking av frágreiðingini frá landsgrannskoðanini, og um tað í frágreiðingini eru ábendingar um, at tað eru trupulleikar við langtíðarhaldførinum hjá Bústaðir, so hevur landsstýriskvinnan brotið lógina.

Fyrst er at viðmerkja, at tað sýnist løgið, at nevndin staðfestir páhaldið um, at tað eru ábendingar um trupulleikar við langtíðarhaldførinum út frá einum svari frá Landsgrannskoðanini, sum sigur, at tað eru fleiri og týðiligar ábendingar um, at tað eru trupulleikar við langtíðarhaldsførinum. Tað upplagda, tá ið talan er um at meta um prógv er fyri onkrum, at nevndin tulkar frágreiðingina, og ikki kannar, hvussu onkur annar tulkar hana.

Í øðrum lagi, sýnist tulkingarhátturin við at taka út ein setning, uttan at hyggja eftir heildini, at verða alt ov avmarkandi, serliga tá ið hugsað verður um eitt revsimál. Tað sýnist sum nevndin gloymir, at próvbyrðan liggur á nevndini, og tað er nevndin, sum skal prógva, at tað er hent eitt lógarbrot, og ikki landsstýriskvinnan, sum skal prógva at hon er ósek.

Tað, sum nevndin í veruleikanum ger við hesum, er at siga, at landstýriskvinnan segði soleiðis:
***At hon ikki hevur fingið ábendingar um at trupulleikar vóru við fíggjarliga haldførinum hjá grunninum <u>sambært frágreiðingini hjá Landsgrannskoðaranum</u>.***

Seinasti parturin omanfyri er ikki sagdur av landsstýriskvinnuni, men er tulkingin hjá nevndini um, hvussu tað, sum hon sigur skal skiljast.

Neyðugt er tó at hyggja eftir heildini, tá støða skal takast til, um talan er um eitt revsivert brot á løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins.

Eg havi verið ígjøgnum orðaskiftið, serliga við atliti til at vísa á, at tulkingin byggir á skeivar fortreytir. Eitt er, at Løgtingið í 2. viðgerð av málinum hevur haft eina drúgva viðgerð av frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini. Eg síggi eisini, at landsstýriskvinnan undir orðaskiftinum ikki fjalir, at frágreiðingin vísir á trupulleikar. Sum dømir skal eg vísa á fylgjandi brot úr orðaskiftinum undir 3. viðgerð, har landstýriskvinnan umrøður frágreiðingina hjá Landsgrannskoðanini og trupulleikar hjá Bústøðum.

***nú er tíðin stutt til triðju viðgerðina, eh, men eg haldi, at, eh, tað bleiv væl svarað upp á líkasum tann kritikkin, sum, sum kom í landsgrannskoðanini***

***eru trupulleikar við langtíðarhaldførinum – tann frágreiðingin er ikki liðug enn – so skal mann sjálvandi gera nakað við tað. Eh, tað síggi eg ongar ábendingar á, sum nú er, men er tað tað, so tekur mann tað.***

***at tað er serliga hetta fíggjarliga haldførið, sum kjakið hevur snúð seg um, og eg eri í áhaldandi samskifti við stýrið... at tann seinasta tíðin hevur verið tung hjá Húsalánsgrunninum, og tað koma vit eisini at síggja í tí roknskapinum, sum løgtingsgrannskoðararnir hava biðið um fyri tjúgu-trýogtjúgu. Hann fer at, ella, hann gevur eitt hall á tvær komma seks milliónir krónur, og tað, sum serliga tyngir, tað er, at rentan er farin so nógv upp, og kostnaðurin á byggimarknaðinum er eisini farin upp. Og tey problemini eru ikki serstøk fyri Bústaðir. Tað eru yvirhøvur avbjóðandi tíðir á bústaðarmarknaðinum. Men mann hevur lagt eina ætlan fyri, hvussu mann skal rætta tað. Mann skal spara í rakstrinum. Man skal til dømis talgilda raksturin og dagføra kt-skipanir. Tað er neyðugt at arbeiða við fíggingini. Mann má skipa mannagongdir fyri fíggjarstýring og rapportering. Mann skal gera ætlanir fyri stutt- og langtíðarviðlíkahaldið av leiguognunum. Og so má mann yvirhøvur hyggja eftir, eh, hvussu mann skipar fíggingina, eh, av byggingini, og eisini hava váðastýring. Tað er neyðugt at, eh, at, eh, byggja bíligari eisini, og tað er neyðugt at samstarva meir við onnur.***

***Harafturat, so vísir landsgrannskoðanin á nøkur viðurskiftir, sum eiga at verða tillagaði. Og tað er eisini nakað, sum eg eri, og sum mann alla tíð er í samskifti við stýrið um.***

Sum tað sæst fjalir landsstýriskvinnan ikki, at Landsgrannskoðanin vísir á trupulleikar við Bústøðum. Harafturímóti ger hon beinleiðis vart við, at Landsgrannskoðanin hevur atfinningar og vísir á viðurskiftir, sum skulu verða tillagaði. Hon sigur eisini, at hon er í leypandi samskifti við stýrið fyri Bústøðum, og endurtekur nógv av teimum viðurskiftum, sum Landsgrannskoðanin ger vart við. Fyri at taka úr rúgvuni, so vísir hon á hækkandi rentuna, hækkandi byggikostnað, at tað skulu gerast sparingar í rakstrinum, skipast mannagongdir fyri fíggjarstýring, gerast ætlanir fyri stutt- og langtíðarviðlíkahaldi og hava eina váðastýring.

Eg vildi sjálvur mett, at útsøgnin hjá landsstýriskvinnuni er hennara meting eftir, at hon hevur verið í samskifti við stýrið fyri Bústaðir. Tulkingin má verða tann, at eftir, at landsstýriskvinnan hevur verið í sambandi við stýrið fyri Bústaðir heldur hon ikki, at trupulleikarnir ávístir av Landsgrannskoðanini, eru av tílíkum slag, at teir geva ábendingar um trupulleikar við langtíðarhaldførinum, tí Bústaðir fer at seta í verk tiltøk, sum rætta búskapin til.
At tulka útsøgnina til at verða, at frágreiðingin hjá Landsgrannskoðanini ikki gevur ábendingar um trupulleikar, stendur í beinleiðis andsøgn til tað landsstýriskvinnan sigur undir orðaskiftinum við 3. viðgerð.

Samstundis má mann minnast til, at løgtingslimirnir frammanundan hava fingið útflýggjað frágreiðingina, og hon hevur verið partur av kjakinum undir 2. viðgerð. Tað kann tí ikki metast,

at nakar ivi hevur verið millum luttakararnar í kjakinum, at trupulleikar vóru nevndir í frágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini

Eg skal fyri mín part eisini viðmerkja, at tulkingin við at taka ein setning burturúr heildini, og at halda hesum uppímóti frágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini sýnist rættuliga einoygd, og stríðir beinleiðis móti tí rættartrygd, sum er galdandi fyri øll, tá støða skal takast til um eitt lógarbrot er framt.

Sum nevnt omanfyri undir pkt. 3, so er eisini galdandi prinsippið um in dubio pro reo, at ivin kemur tí ákærda til góðar. Heldur ikki er tað á nakran hátt gjørt sannlíkt, at ætlanin hjá landsstýriskvinnuni hevur verið at villeiða løgtingið, hvørki tilvitað ella við grovum ósketni.

Eg havi, sum nevnt omanfyri undir pkt. 1, í mínari gjøgnumgongd av málum hjá landsstýrismálanevndini ikki koma á nakað fordømi um at landsstýrismálanevndini hevur staðfest brot á lóg um ábyrgd landsstýrisins.

## 5. **Samanumtøka**

Arbeiðið hjá nevndini er at gera eina rættsliga niðurstøðu, og ikki eina politiska niðurstøðu. Tá tað er sagt merkir hetta ikki, at limirnir í landsstýrismálanevndini ikki kunnu seta spurningar til eitt løgfrøðiligt tilmæli, og herundir reisa spurningin, um treytirnar eftir einum rættarligum sjónarmiði eru rætt viðgjørdar. Hetta vísandi til, at talan er um eina rættsliga meting í einum revsimáli, sum setur serlig krøv til prógvbyrðuna. Nevndarlimirnir skulu taka støðu til, havandi vanligu rættartrygdarreglurnar í huga, um landstýriskvinnan kann verða dømd sek fyri at hava brotið § 5, stk. 2 í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Um nevndin ikki metir, at landsstýriskvinnan kann verða dømd fyri brot á lógina um ábyrgd landsstýrismanna, ella nevndin ikki meinar at málið eigur at verða sent til ein kanningarstjóra, fellir málið úr málsræði nevndarinnar, og nevndin skal vísa klaguna frá sær.

Mín egna niðurstøða er tann, at forarbeiðið til fyribils niðurstøðuna ikki lýkur minstutreytirnar fyri eina roynd av, um ein ákæra mest sannlíkt eisini vil føra til ein dóm. Eg meti ikki sjálvur, at orðavalið hjá landsstýriskvinnuni kundi misskiljast, tá ið eg aftaná las orðaskiftið.

Tórshavn, tann 7. oktober 2024

Annfinn V. Hansen, adv. (H)
annfinn@advokat.fo